# Skemt



## Neyvan so festligt

Norðurírsku áskoðararnir settu veruliga dám á Havnina og Svangaskarði í vikuni. Áskoðararnir vóru í góðum lag alla tíðina, og teir stuðlaðu sínum liði væl til landsdystin ímóti Føroyum. Men heilt erligt, tað mann neyvan verða festligt at síggja soleiðis út sum maðurin á myndini, tá mann hevur snávað ímóti Føroyum.



Bergtóra Høgnadóttir Joensen

Slept upp á fjall við sjúkradagpeningi

## Tey mugu verða illa fyri

**Hendan yvirskriftin á viðmerking hjá løgtingskvinnuni Bergtóru Høgnadóttir Joensen boðar ikki frá góðum. Eru tað veruliga fólk, um sum í hesum fjalltíðum, verða slept upp á fjall – enn tá við sjúkradagpeningi? Kanska ikki besta trekkið at senda fólk, sum fáa sjúkradagpening, á fjall.**




## Hvaðani er hesin?

Nú um dagarnar hitti Sosialurin eitt par, sum hevur siglt í norðuratlantshavi og polarøkinum seinastu tvey árini. Tá ið vit komu heimaftur, sóu vit, at maðurin var heldur øðrvísi útgjørdur. Okkum vitandi var maðurin úr Týsklandi, men kanska hendan myndin kann fáa fólk at ivast í, hvaðani og hvør maðurin er.

## Í RANGASTRÚPAN

**Hvat gera teir har?**
Farnir undir ferjuleguna
*Sosialurin*

**Frá toppi til tá**
Eiga at endurskoða Løgtingsins umboðsmann
*Kringvarp.fo*

**Lokalblað?**
Norðlýsið samsendir beinleiðis úr Chile
*Norðlýsið*

**40 tung ár**
Drúgvi andróður Michelsens
*Dimma*

**Sjálvspíning?**
Søkt verður eftir timburmonnum
*Starvslýsing á portal.fo*

**Reiðarí við drotning**
Bók á veg um Drotningina hjá DFDS
*Dimma*

**Nú fóru danir við Eik**
Eik Banki í Fólkatinginum í morgin
*Kringvarp.fo*

**Okay?**
Kappingarráðið: Posta hevur ikki monopol
*Kringvarp.fo*

**Neyvan aftur í tíðina**
Sparikassin setir kós inn í framtíðina
*Norðlýsið*

**Sikken eitt lív!**
15 ár uttan haru
*Sosialurin*

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Eina við øllum

Tað hevði verið øgiliga og søguliga stuttligt og ikki minst hugvekjandi at gjørt eina fíggjarlóg, har sum øll ynski og øll krøv, og eg sigi øll, eru tikin við. Allir dreymar eisini og ynskidreymar sjálvandi. Men engin marra.

Øll berghol og allir undirsjóvartunlar, sum eru nevnd higartil, okkurt um 30, tíggju prosent í lønarhækking, tjóðleikhús, Landssjúkrahús uttan eykajáttanir, brennivín og mjólk fyri danskar prísir og so framvegis, og so framvegis. You name it.

Og so lagt tølini saman fyri at vita, hvussu nógvar milliardir, ein slík fíggjarlóg fór at kosta.

Síðani rokna út, hvussu nógv skattur og avgjøld skuldu fara upp fyri at gjalda alt hetta gildið.

Tá hevði blivið áhugavert at sæð, hvør hevði hug at gjalda nógv meira fyri at fáa nógv meira. Skal eg gita, eingin. Tí øll vilja bara hava, eingin vil lata og enn minni gjalda.

Vilja heldur blaka pengarnar burtur í partabrøvum og lánum at keypa partabrøv fyri. Bara ikki pengarnir fara í felagskassan.

Samhaldsfesti virkar bara, tá tað er álagt við lóg, sum eingi hol eru í, tøtt sum lønarsamráðingar vikur eftir deadline.

Tá eg gekk í studentaskúla mótmæltu vit amerikonsku innrásini í Vjetnam. Og onnur, tey sum hildu við USA, mótmæltu okkum.

Nú mótmæla tey øll, at skattgjaldarin ikki skal gjalda árliga rukkutúrin við Norrønu.

Tey ungu í miðnámsskúlunum nú mótmæla ikki innrásunum hjá danska ríkinum í Afganistan ella í Irak. Tær raka líka sum ikki soleiðis har tey.

Ein inntøkukelda hjá sperda landskassanum, sum skal vera dadda hjá Gudi og hvørjum føroyingi, kann vera tann eyðsýnda, at øll, sum skriva undir mótmæli og krøv, lata landskassanum 1000 krónur fyri hvørja undirskrift.

Og skúlabøkur? Hví kosta tær so nógv? Tær eru so gamlar, at tær eiga at fáast fyri fimm krónur hjá Reyða Krossi í Vágsbotni.

Pengar eru ikki alt, siga tey, sum ikki duga við pengum, ikki hava skil fyri pengum, ongar pengar eiga, hava gamblað allar í einum rúsi, einum drúgvum tørni, út í tóman fíggjarheim.

Pengar eru ikki alt. Ein uggi, javell. Men alt verður tó gjørt upp í pengum.

Minnist drúgvu kjakini um kapitalismuna fyrst í hálvfjerðsunum. Var í Danmark tá. Kapitalisman fekk milulm annð eisini skyldina fyri at infiltrera, sníkja seg inn í málið. Flætta pengarnar inn í vanligt málbrúk. Eitt dømi er, sum illa kann umsetast beinleiðis til føroyskt, ikki á skriftmáli: kan det betale sig? Det betaler sig ikke.

Hómi okkurt um, at eg segði, tá Sparikassin fór at tvætla uppi í vinnuni, at hatta endar galið. Hatta betalir seg ikki. Vinnan er í kroniskari kreppu. Hon hevur ongantíð ráð at gjalda síni lán, heldur ikki millum heimskreppurnar og millum lokalu kreppurnar. Haldið tykkum til sethúsalánini, segði eg. Eingin lurtaði sjálvandi. Men var onkur, sum gav sær far um tað, eg segði, var svarið: dómadagsmøsn.

Sum vit nú síggja vóru bonaðu gólvini í Føroyum ikki nóg hál.

Men, sum sagt, hví ikki gera eina fíggjarlóg, sum øll eru nøgd við? Lallandi optimisma er betri enn vanlig optimisma og nógvar fíggjarlógir betri enn realisma.

Eina fíggjarlóg við øllum og kettsjupp í eitt jørn, takk. Vit eru váðafús, come on!. Tí vit vita, at Danmark loftar okkum, koma vit alt ov nær tromini. Danmark er har fyri okkum, hvørja ferð.